# Finnur Hansen við savnsfløgu

**Leygardagin kemur út fløga við 35 ymsum sangum, sum vælkendi Finnur Hansen tey seinastu 25 árini hevur givið út. Kendasti sangur er Undurfulla Land**

FLØGA
*Tíðindaskriv*

Finnur Hansen er kendur av teimum flestu, og neyvan man tað vera ein, ið ikki kennist við sangin »Undurfulla land«, ið á ein hátt gjørdist ein sonn landaplága fyrst í áttatiárunum. Fyrsta plátan var innspæld yvir í Oslo við norskum tónleikarum, tó so at Brandur Øssurson og Victor Carlsen vóru eisini við á nøkrum sangum.

Tað var av berari tilvild at tað varð júst sangurin »Undurfulla land«, ið gjørdist tann best dámdi. Sangurin var nevniliga lagdur sum nr. 1 á B-síðuni, men soleiðis skuldi tað nú einaferð verða.

### Úr Noregi til Føroya

Áttatiárini vóru so tey mest virknu sangárini hjá Finni, tí longu í 1984 kom næsta plátan, ið fekk heitið »Gylti morgun«. Henda plátan gjørdist eisini væl dámd, og var hon hesuferð innspæld í Kristiansand við norskum og føroyskum tónleikarum og kórsangarum.

Nevnast kann at henda útgávan var eisini í sama umfari innspæld við norskum sangtekstum og givin út á plátuforlagnum Klango, ið gav plátuna út sum eina LP 4, t.v.s. eina bíliga útgávu, ætlað sum evangeliserandi tilfar at nýta.

Longu árið eftir, so hvørt sum LP-pláturnar vóru á veg út av marknaðinum, og ikki vóru prentaðar meir, kom enn ein innspæling sum eitt kasettuband, kallað »Ein himmal er«. Nú varð avgerð tikin um at taka upp í Føroyum, tí studioviðurskiftini vóður eisini batnað her heima um tað mundið. Upptøkurnar vórðu gjørdar hjá REMA í Runavík við føroyskum tónleikarum og sangarum.



*Allir sangirnir hjá gospelsangaranum Finni Hansen verða nú givnir út á einari fløgu*

### Virkin sangari

Finnur hevur eisini luttikið á øðrum innspælingum, sum til dømis »Gospel-Brot« og »Míni jól« og eru hesir sangir eisini tiknir við á savnsfløguna. Ikki minst hevur Finnur verið sera virkin á møtum og stevnum, har sermerkti sangur hansara hevur verið til gleði fyri mong. Sangúrval hansara eru teir flestu sokallaðu evnagelisku sangirnir, ið hava verið og verða sungnir í kirkjum og samkomum regluliga.

Eitt sum hevur sermerkt Finnur er, at familjan altíð hevur stuðlað væl við sangluttøku til flestu innspælingarnar, og ringt vildi verið hesa hjálp fyriuttan. Bæði á upptøkum og luttøku annars á møtum og stevnum, hevur familjan staðið saman sum ein eind og verið við í hesum andaliga verki.

Finnur er í dag 75 ára gamal og still going strong. Hóast sjúku seinastu tíðina, so er hann í dag so mikið væl fyri, og kann saktans vera við, har boð eru eftir honum at syngja.

Tað er plátufelagið Tutl, ið stendur fyri útgávuni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av norði og ælingur, men týsdagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 13 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 4 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 15 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 15 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 988 hPa. eystan fyri Jan Mayen fer móti Íslandi, Eitt annað lágtrýst, 981 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga í útnyrðing.




Lágtrýstið við Hetland fer spakuliga norðureftir og sendir kalda luft av norði móti Føroyum. Lágtrýstið í útsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og verður væntandi sunnan fyri Ísland sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/10 kl. 06⁰⁰– 30/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,0°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 29/10 kl. 06⁰⁰–30/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 62,3 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

25. oktober: Tendring
26. oktober: Mánin næstur jørðini
1. november: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. okt | 11.28 | 23.57 | 10.28 | 22.57 | 10.43 | 23.12 | 01.00 | 13.28 | 02.00 | 14.28 | 09.43 | 22.12 | 08.43 | 21.12 | 11.43 | — | 00.15 | 12.43 | 11.13 | 23.42 | 00.00 | 12.28 |
| 1. nov | — | 12.36 | 11.36 | — | 11.51 | — | 01.57 | 14.36 | 02.57 | 15.36 | 10.51 | 23.31 | 09.51 | 22.31 | 00.12 | 12.51 | 01.12 | 13.51 | — | 12.21 | 00.57 | 13.36 |
| 2. nov | 01.16 | 13.53 | 00.16 | 12.53 | 00.31 | 13.08 | 03.16 | 15.53 | 04.16 | 16.53 | — | 12.08 | 11.08 | 23.45 | 01.31 | 14.08 | 02.31 | 15.08 | 01.01 | 13.38 | 02.16 | 14.53 |
| 3. nov | 02.30 | 14.52 | 01.30 | 13.52 | 01.45 | 14.07 | 04.30 | 16.52 | 05.30 | 17.52 | 00.45 | 13.07 | — | 12.07 | 02.45 | 15.07 | 03.45 | 16.07 | 02.15 | 14.37 | 03.30 | 15.52 |

5 707265 100050 >